# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Føroya Handilsskúli, Tórshavn:

## 17 lærarar fingið Námsfrøðiligt KT-prógv

**Hósdagin 24. juni 2004 fingu 17 lærarar á Handilsskúlanum í Havn handað Námsfrøðiligt KT-prógv. Endamálið við eftirútbúgvingini er at menna teirra førleika til at nýta KT í frálæruni.**



*Á myndini eru frá vinstru: Sonja Petersen, Elsa Jóhanna Høgenni, Hertha Olsen, Gloria Kalsø, Mina Reinert, Mikkjal Mikkelsen (vegleiðari), Kalpana Vijayavarathan, Finn Jensen, Regin Ellingsgaard (leiðari KT-depilin), Klæmint Olsen, Birgir Mortensen, Olav Absalonsen, Hans Olivur Joensen (vegleiðari), Tórður Johannesarson, Heðin Samuelsen, og Aref Tórsson Olsen. Á myndini vanta: Jóan Pauli Poulsen, Maryann Due Olsen, Alex Ocampo, og Bo Warberg*

## Fyrstu nemingar-námsfrøðingarnir fingið prógv

**Fríggjadagin 19. juni fingu fyrstu nemingar-námsfrøðingarnir prógv. Nemingar-námsfrøðingur er betur kent undir heitinum, taktil-pædagogur. Lærari á skeiðnum var svenska, Birgith Grundberg, sum er zoneterapeut og lærari í nemingar-stimbran**



*Aftast frá vinstru: Birgith Grundberg, lærari, Osla Gøthe, Selma Tindalíð, Olga Horn, Annika K. Joensen.
Fremst frá vinstru: Anna Jørmundsson, Inga Jensen, Paulina Andreasen og Lív Joensen*

Nemingar-stimbran hevur nógv ár á baki, og eru umleið 3000 sviar, sum hava hesa útbúgving.

Útbúgvingin er partvíst ástøðislig, men starvsvenjingin hevur verið drúgv, og endaði skeiðið við teoretiskari og praktiskari próvtøku. Samanlagt hevur skeiðið vart í 11 vikur.

Henda útbúgving verður serliga nýtt innanfyri skúla- og almannaverkið, og eru tað lærarar, námsfrøðingar og sjúkrarøktarfrøðingar, sum hava luttikið á fyrsta skeiðnum í nemingar-stimbran, sum varð hildið í Runavík.






# Tað ræður um at skilja frá

**Fyri 20. ferð var mikukvøldið pisufundur á Gøtusandi, har 66 studentar og HF arar saman við familju og kenningum og hinum, sum enn eina ferð vildu uppliva serliga hýrin, fegnaðust í góða summarveðrinum**

PISUFUNDUR
*Jonhard Hammer*

Viðhvørt er veðrið ikki so gott. Men oftast eydnast tað væl. Her verður hugsað um pisufundirnar, sum fram ímóti skúlaársenda verða hildnir á Gøtusandi. Mikukvøldið vóru 66 studentar og HF arar á Gøtusandi, har kommunan hevði ruddað og hampað, og har hýrurin var sera góður.

Gestarøðari var Jan Berg Jørgensen. Hann arbeiðir í sjónvarpinum. Áður hevur hann verið lærari í studentaskúlanum á Kambsdali, har hann hevur undirvíst í eingilskum og filmi og sjónvarpi. Fyri trettan árum síðani stóð hann við húgvuni á høvdinum á Gøtusandi.

Jan sveimaði víða í síni røðu. Høvuðsboðskapurin var, at tað hjá ungu fólkunum ræður um at velja og vraka. At skilja lortin frá tí góða, sum hann málbar seg.

Fyri studentarnar røddi Jákup Dahl av Kambsdali, og fyri HF ararnar tosaði Sóley Magnussen úr Lamba. Símun Joensen úr Klaksvík var orðstýrari.

Fuglafjarðar hornorkestur spældi. Endað varð við tjóðsanginum, sum varð sungin á tamb. Mannfólkini stóðu við húgvuni í hondini, og konufólkini við húgvuni á høvdinum. Akkurát sum tað sambært gomlu siðvenjuna eigur at vera.



*Pisufundurin varð hildin í fagrasta veðri*

So varð heilsað uppá og ynskt tillukku. Dúgliga varð klikt og filmað, og Per á Hædd syrgdi fyri, at hvør flokkurin varð søguliga dokumenteraður. Myndir av øllum flokkunum, sum hava gingið í studentaskúlanum í Eysturoy hanga í gongini á skúlanum.

Á Kambsdali vórðu prógvini handað hósdagin seinnapartin. Tað gekk fyri seg í ítróttarhøllini á Kambsdali. Tá vóru næmingarnir aftur í fínasta skrúð. Teir flestu vóru í føroyskum búna. Í sambandi við hesa hátíðarløtuna framførdu næmingar, sum hava havt tónleik á hástigi, sang og tónleik undir leiðslu av Eyðuni á Lakjuni.

Pisurnar úr Norðoyggjum komu við fylgi um Leirvíksfjørð. Hesa ferð var tað sjóvegis. Hjá teimum, sum eftir summarfrítíðina fara undir útbúgvingar á Kambsdali og búgva hinumegin Leirvíksfjørð, verður tað øðrvísi. Um alt gongur, sum tað verður roknað við og ætlað, so verður tað um trý ár koyrandi úr Klaksvík og til Leirvíkar.

Síðani í 1982 hevur studentaskúli verið í Eysturoy. Øll árini síðani tá hevur skúlagongdin og øll tiltøk í tí sambandinum verið lagað eftir ferðasambandinum um Leirvíksfjørð. Soleiðis verður tað eisini tey bæði næstu árini. Men nú verður tað ikki so leingi, at tað ikki verður øðrvísi hjá teimum av Viðareiði at fara til tiltøk á Kambsdali, enn tað hevur verið og er hjá teimum í Saksuns og Tjørnuvík og Toftum og Selatrað.

Í sambandi við próvhandanina segði Sámal í Skorini, rektari á Kambsdali, at nú hava 1526 næmingar lokið studentsprógv ella HF prógv í Eysturoyar Studentaskúla og HF skeiði.

Nú eru pisurnar farnar av Kambsdali. Framtíðin fer at vísa, hvussu væl tær fara at duga at skilja tað góða frá tí minni góða. Onkur fer beinanvegin undir víðari útbúgving. Fleiri fara at hvíla frá bókunum og fara at finna sær eitt arbeiði. Onnur ætla sær at ferðast. Felags fyri øll er ivaleyst, at tey hava framtíðar ætlanir, og tað er rættuliga týdningarmikið fyri ungu fólkini.



*Tað var ein vøkur sjón at síggja studentar og HF-arar standa í húgvu og tjóðbúna*



*Glaðir studentar avmyndaðir á Gøtu sandi*